# Sørvágs skúli

Skúlavegur 13 . FO-380 Sørvágur
Tlf. 36 32 22 & 23 32 22
Fax 36 32 21 · sor@skulin.fo

## Lærarastørv í Sørvágs skúla

**Søkt verður eftir:** 3 lærarum í tíðaravmarkað fulltíðarstørv skúlaárið 2009/10 vegna farloyvi, lækkað tímatal, til serligan tørv og til avlopstímar.

1 lærara í tíðaravmarkað starv 2009/10 við niðursettum tímatali vegna avlopstímar. Endaliga tímatalið verður ásett eftir 1. september 2009.

**Okkum tørvar lærarar, sum kunnu undirvísa í:**

- Føroyskum
- Støddfrøði
- Alis-/evnafrøði
- Dreingjaítrótti
- Donskum
- Lívfrøði
- Náttúru og tøkni

**Førleikakrøv:** Lærarаútbúgving og førleika í viðkomandi lærugreinum.

Størvini eru lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokki 18.1 – 29.2

Nærri kunning um størvini fáast við at ringja til Andrass Henriksen, skúlastjóra, á tel. 363222 ella 233222, ella Eyð Niclasen, varaskúlastjóra, á tel. 223670

Umsóknir við avriti av prógvi, CV og møguligum viðmælum skulu stílast til Sørvágs skúla, Skúlavegur 13, 380 Sørvági og verða skúlanum í hendi í seinasta lagi 21. apríl 2009 kl. 12.

Í Sørvágs skúla eru 145 næmingar í 1. til 10. flokki. 16 lærarar starvast í skúlanum. Lærarar skúlans hava fyrireikingarhøli við egnum skriviborði og egnari farteldu.


tað ganga tann vegin, at lágprís vørurnar eru meiri eftirspurdar enn tær dýraru vørurnar. Men alt í alt er handilsbransjan ein rættiliga stabil bransja at vera í, sigur Jaspur Johannesen.

Hann sigur, at ein av grundorsøkunum til, at teir hava fleiri handlar, er, at teir tá kunnu keypa inn til júst røttu prísirnar.

– Og fyri at kunna vera við er neyðugt at hava røttu støddina, og tað er ein av høvuðsorsøkunum til, at vit hava fleiri handlar, sigur Jaspur Johannesen.

Tað eru nógv fólk knýtt at teimum fýra Inn-handlunum.

– Vit hava leingi opið, frá klokkan átta á morgni til tíggju á kvøldi mánadag til leygardag, so vit hava nógv fólk í parttíðar starvi, nógv arbeiða eftir skújlatíð. So saman við teimum fast ansettu er talan helst um eini 100 fólk í starvi hjá okkum, sigur Jaspur Johannesen.

Men tað eru ikki bert Inn-handlar, sum hann fæst við.

Nei, tað er rætt. Vit hava latið ein X-tra handil upp í miðbýnum í Havn, og fara innan stutta tíð at lata ein líknandi upp í Klaksvík, sigur Jaspur Johannesen.

Her er talan um ógvuliga øðrvísi handlar. Har fæst ein rúgva av vørum fyri ógvuliga bíligan penga, og úrvalið er eisini stórt. Talan er eisini um ógvuliga skiftandi vørur og gjøgnum árið eru kanska so mikið sum túsund ymiskar vørur at fáa í handlinum.

Hann heldur, at tað positiva við framtíðini er, at vit ikki kenna hana til fulnar.

– Vit taka ein dag í senn og trívast væl í tí, vit hava. Vit ætla okkum sjálvandi ikki at steðga upp, men júst hvussu og hvat dugi eg ikki at siga í løtuni, sigur Jaspur Johannesen.




*Partur av manningini á Inn við Norðskála. Tilsamans eru eini 100 starvsfólk knýtt at teimum fýra Inn-handlunum*


